


# Hernaðarlig tvíkilja


Norsk herflotavitjan á Havnini um dagarnar
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ein hernaðarmálað tvíkilja lá við bryggju í Havn um dagarnar. Talan er um norskt far, sum hevur verið framsýningartúr í Amerika**

VITJAN

Norska hernaðartvíkilja Skjold kom á Havnina týskvøldið á veg úr Amerika aftur til Noregs.

Hetta er aðru ferð í umleið eitt hálvt ár, at hendan ser skjóttgangandi tvíkiljan er á Havnini.

Fyrru ferð var, tá hon á veg til Amerika á framsýningartúr legði at her og varð liggjandi nakrar dagar.

Hesaferð skal hetta sjáldsama farið liggja í tvey samdøgur, vita tey at siga frá á havnarskrivstovuni í Havn.

Skjold kom úr Vestmannaoyggjum, har hann var inni eftir fyrst at hava vitjað í Reykjavík ávegis úr USA.

*ej*

## Rullubretti á alfaravegi sera vandamikil

**Tað snýr seg bara um tíð, nær okkurt barn á rullubretti endar undir onkrum bili, sigur Ferðslutrygd**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

Seinnu árini hevur tað vundið meira og meira upp á seg, at børn aka á rullibretti (skateboard) úti á vegnum, har bilar koyra. Mangur bilførari man hava fingið skelk, tá ið hann næstan hevur koyrt á barn, sum liggjandi á búkinum á rullibretti er komið við fúkandi ferð millum bilar – ella undan húsum á alfaravegi. Eitt er at tey illa síggjast í dagslýsi, tí at tey eru so lágt, annað er tey á kvøldi eru myrk og eru als ikki at síggja.

– Orsøkin til at hesin spurningur verður reistur nú, er ikki at trupulleikin er uppstaðin í dag. Men á skrivstovuna hjá okkum kom í dag skelkaður bilførari, sum heitti á okkum um at gera okkurt við hetta vandamál. Hesin vil fegin siga frá síni skelkandi uppliving í teirri vón, at skilið verður betri, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd

Hann sigur, at tey kunnu ikki annað enn taka fult undir við hesum og í roynd og veru er spurningurin bara um tíð, nær onkur liggur undir einum bili.




## Skúlin í Hoyvík 25 ár

**Samanleggingin við Tórshavnar Kommunu og nógva sethúsabyggingin í Hoyvíkshaganum elvdi til, at skúlabarnatalið vaks nótg skjótari enn væntað**

SKÚLI
*Eirikur Lindenskov*

Í hesum døgum eru 25 ár síðani, at skúlin í Hoyvík varð tikin í nýtslu. Tá vóru 77 næmingar og seks lærarar á skúlanum.

Upprunaliga var skúlin bara ætlaður til sjey flokkar. Men nógv vatn er runnið hesi seinastu 25 árini, og so hvørt sum íbúgvatalið í Hoyvík er vaksið, er næmingatalið eisini fleirfaldað í skúlanum – skúlabarnatalið vaks nógv skjótari enn væntað.

Í 1992 var skúlin útbygdur til tað dupulta, men næmingatalið bara vaks ár um ár.

Við skúlaársbyrjan í ár eru tríggjar skúlastovur komnar afturaat – og ein ítóttarhøll, nevnd Hoyvíkshøllin.

Nú eru 17 vanligar skúlastovur og 19 flokkar í skúlanum. Næmingatalið er 439, og lærararnir eru 30 í tali.

25 ára dagurin hjá Hoyvíkar Skúla verður hildin í morgin, fríggjadagin. Fyrrapartin verður serstakur skúladagur saman við næmingunum við ymiskum tiltøkum. Seinnapartin kl 14 – 16 er skúlin opin fyri vitjandi.






# Nýggi parturin av SMS latin upp


*Norðari endi av SMS lat uppaftur í gjár*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

NÝBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Mikudagin læt nýggi parturin í SMS í Havn upp aftur. Hetta er ein liður í størri útbygging, sum SMS hevur verið í holt við seinastu mánaðarnar.

Handlarnir Skálkur og Klivin hava í seinastuni húsast á torginum í SMS, men í gjár kundu teir lata uppaftur í snotiligum og hugnaligum nýggjum umhvørvi.

Mango hevur verið afturlatið síðani ólavsøku, og eisini kundu tey lata uppaftur í snotiligum búna.

Ein nýggjur handil er komin í norðara endanum av SMS, og er tað ítróttarhandilin Sportsmaster.

WC-ini eru flutt, og eru tey eisini spildurnýggj.

Elektriskar hurðar eru nú komnar í norðara enda, og noyðist tú upp á, fyri at sleppa inn í handlarnar. Og sum nakað heilt nýtt, er eisini ein lyfta, so tey í koyristóli eisini sleppa í Klivan, Mango, Sportsmaster og Skálk at keypa.

Ikki er alt rættiliga liðugt enn. Nakað av máliarbeiði vantar í enn, men longu nú sær alt snotuligt og nýtt út.




**Støðleiðari til Shell í Klaksvík**

Í sambandi við at P/F Føroya Shell yvirtekur Shell Quick Service frá Dáva Joensen og at avgreiðsluskrivstovan í Norðoyggjum samstundis verður flutt av Grótrætt inn á støðina, verður við hesum søkt eftir leiðara.

***Starvið:***
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum bæði fevnir um dagligu leiðsluna av Shell-støðini, av øllum søluarbeiðinum, rakstrinum og av umsiting okkara í Norðoyggjum. Samstundis umfatar starvið eisini ábyrgdina av gomsluni á Grótrætt.

***Eginleikar:***
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- hevur staðkunnleika
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar
- tekur undir við handilsmeginreglunum hjá Shell (sí www.shell.fo)

***Løn:***
Vit bjóða eina góða løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

***Umsóknir:***
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Leiðari Klaksvík" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 30. sept. 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara ella Hákun Djurhuus, stjóra á telefon 347400.

P/F Føroya Shell hevur deildir í Klaksvík, Suðuroy, Eysturoy og Tórhavn. Tað eru 10 Shell-støðir kring landið og uml. 100 fólk starvast hjá Shell í Føroyum. Shell eigur og rekur eisini tangabátin "MAGN". Árliga umsetur Shell fyri uml. 400-500 mio.kr. Virksemið hjá Shell í Føroyum hevur síðani 1973 verið í føroyskum partafelag, sum er ein partur av Royal Dutch Shell.

www.shell.fo

team 85 • 358000